TILTØK

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í høllini hjá Tvøroyrar Handverkarafelag. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14, kl. 18 møti við Jens og Nimrod. Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Jacob Danielsen og Eivind Bech. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Í juni og juli er bønarfundurin mánakvøld lagdur saman við uppbygg. fundinum ónskvøld.
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskur fundur, kl. 21.00 Útifundur um viðrar. Ónsdagin kl. 20.00 Bønar- og Uppbyggingarfundur

Frelsunarherurin, Vágur
Leygarkvøldið kl. 20 útimøti í Porkeri um viðrar. Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Toril Waag Olsen.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 11. juni:
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
Týsdagin 12. juni:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Filmur frá Havnini 1927. J. A. Arge
Mikudagin 13. juni:
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Vit vitja urtagarðin í Skræddaragøtu
Hósdagin 14. juni:
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 15. juni:
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 10. juni verður gongutúrur út á Borðuna. Farið verður av Bursatanga kl. 10.00. Havið heit og góð gongukleði og matpakka við. Tilmelding.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygarmorgunin kl. 9-10 roykfríur fundur.
Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

AA-kvinnufundur
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Opin AA-kvinnu fundur í Havn sunnukvøldið kl. 20.

VBA
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
(Vaksin børn hjá alkoholikarum) ella ørkymlandi familjuumstøður. Opin fundur sunnudag kl. 17.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email:
punta@post.olivant.fo

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22.
Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adressu: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail:
mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

Cøliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Giktafelag Føroya
MBF Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 fax 310813
e-mail:
gikt@post.olivant.fo
Opið týsdag og hósdag kl. 10-13.
Fibromyalgibólkurin:
Tlf. 310237 týsdag frá kl. 10-12.
Ungdómsumboð:
Sára, tlf. 373106. E-mail:
sara@post.olivant.fo

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419
Skrivstovan er á niðaru hædd og er opin hesar tíðir.
Týsdag fyrrapart kl. 10.00-11.30
Hósdagin seinnapart kl. 16.00-17.30.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail:
ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Føroyska arbeiðið Í Eliaskirkjuni
E-mail:
eliaskirkjan@get2net.dk
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32 969995, ella Ørssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.
Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

Føroyingafelagið við fjørðin
Jægerspris. Vit hava ymisk tiltøk nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið, ella lokalt, so ring til Fríði tlf. 47317438
Gudni tlf. 47387748

Føroyingafelagið í Århus
Vestergade 48D
8000 Århus C
Tel. 86 18 06 04
Húsið er opið mánadag til hósdag kl. 16-18 og fríggjakvøld kl. 21-03.
Føroysku bløðini liggja frammi. Kaffi er ókeypis.
Flogbóltur í Frydenlundskúlanum fríggjadag kl. 16-18. Sunnudagsskúli annanhvønn sunnudag (líka vikur) kl. 14.30.
Føroyskur barnaskúli annanhvønn leygardag (ólíka vikur) frá kl. 11-14.

Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25,
6700 Esbjerg,
tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Telefonupplýsing:
33231586
Dagliga telefonin:
33231587
Fax 33231588
E-mail addressa:
postur@faroehouse.dk
Heimasíðan:
www.faroehouse.dk
Á heimasíðuni er skráin, smátíðindi, feløgini og links víða um.
Kaffistovan er opin má.-frí. kl. 14 - 19
Bókasavnið um somu tíð.
Føroyskur døgverðamatur, fløgur, bøkur og pløgg fáast til keyps.
Vilt tú leiga ella skipa fyri tiltaki í húsinum, vendir tú tær til leiðaran.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 26. juni hava hjúnini Elinborg og Jógvan Torbein Jacobsen, Sandavágur, silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í SÍF-húsinum leygardagin 30. juni kl. 19. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma í veitslu, verða biðin um at siga frá áðrenn 20. juni á tlf. 332355 ella 283179.

BRÚDLEYP

Í dag, 9. juni giftast í Dástrup kirkju Súsan Christensen og Bjarni Joensen, bæði úr Havn. Brúdleypsadr.: Assendløsevejen 16, DK-4130 Viby Sjælland.

Í dag, 9. juni kl. 13 giftast í prestagarðinum í Vági Harriet Hjelm og Johannes Joensen, bæði úr Vági.

Leygardagin 16. juni kl. 16 giftast í prestagarðinum í Vági Gunnbjørg Magnussen, Vágur og Torri Thomsen, Sumba. Brúðarveitslan verður í Samkomuhúsinum í Sumba kl. 19 fyri innbodnum gestum.

Leygardagin 30. juni kl. 15.00 giftast Benadikta Sofía Kruse og Sven Bergur Jensen í Adventistakirkjuni í Tórshavn. Vælkomst verður í Niels Finsensgøtu 32, frá kl. 21. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við luttøku, vinarliga gevið boð áðrenn 12. juni á tlf. 0045 38113519.

Leygardagin 30. juni kl. 15.00 giftast í Sandavágs kirkju Maria Ellefsen, Sandavágur og Jens Tummas Næss, Tórshavn. Veitsla verður fyri innbodnum í Argja Róðrarneysti kl. 19.00.

Fríggjadagin 13. juli kl. 17.00 giftast í Leirvíkar kirkju Ann-Mari Heinesen, Leirvík og Jan E. Petersen, Klaksvík. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, vera vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443254 ella 252070 áðrenn 2. juli.

Leygardagin 21. juli kl. 12.00 giftast í Vesturkirkjuni Sára Skylv Reinert, Havn og Arngrím Sigurd Thomassen, Sandavágur. Brúðarveitslan verður hildin í SÍF-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 332775, 313009 ella 0045 98389554 innan 11. juli

PRÓGV

23. mars tók Anita Hermansen, Innan Glyvur prógv á det Danske Turistakademi í Rønne. Hon er Akademiøkonom í turismu.

Sansir søkir samskipara/ráðgeva

Kanst tú fáa brikkarnar upp á pláss?



Ein kampanja skal leggjast til rættis, og ein miðlaætlan skal leggjast fyri sjónvarp, útvarp og bløð. Faroe Island Tourist Guide og Atlantic Review skulu hava greinar og lýsingar. Eitt tilboð skal heintast upp á ein faldara. Eitt útkast skal gerast, myndir skulu takast og finnast, og týska umsetingin skal fáast til vega. Tað eru nógvir brikkar, sum skulu upp á pláss, og sum skulu samskipast.

Umframt arbeiði sum samskipari, ekalt tú eisini verða fer/ur fyri at tosa við okkara viðskiftafólk um, hvussu teirra vera best verður marknaðarført. Tú dugir væl at skriva føroyskt, og tú dugir væl at samskifta á donskum og enskum. Tú hevur eina hægri útbúgving innan sølu og samskifti ella hevur arbeitt innan hetta øki.

Tú kemur at arbeiða á einum reklamuvirki, sum tekur sær av samskiftisuppgávum fyri fleiri kendar fyritøkur og stovnar, so sum: Atlantic Airways, Tryggingarfelagið Føroyar, Kaupthing Føroyar, Kall, Poul Hansen, PRG, Vestsalmon, Føroya Kolvetni, Als, Vágatunnilin og fleiri onnur. Hugskotið er okkara styrki. Vit gera kampanjur, ið fevna um: lýsingar til bløð, sjónvarp og útvarp, internet, faldarar og onnur tiltøk. Sansir hevur júst nú eisini styrkt uma sín internetførleika.

Ljóðar hetta, sum eitt starv fyri teg, so send umsóknina saman við tilhoyrandi tilfari til okkara. Vilt tú hava meira at vita um starvið, so ring til Høgna ella Hansinu á telefon 355 355.

Vit fara at bjóða tær vælkomnan í okkara spildurnýggju hús við Tinghúsvegin, sum vit flyta inn í 3. september, tá vit eisini rokna við, at tú byrjar.

Seinasta freist at søkja starvið er 15. august.

Umsóknin skal sendast til: Sansir pf, Tinghúsvegur 47, Box 1099, FO-110 Tórshavn, Tel 355 355, Fax 355 350, www.sansir.fo, sansir@sansir.fo

SANSIR

KPMG

Skrivstovufólk

Fyri ein av kundum okkara verður søkt eftir skrivstovufólki at byrja skjótast gjørligt.

Starvið
Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, við serligum at liti til bokhald.

Talan er í fyrstu atlagu um 20 tímar um vikuna, tó verður roknað við at umsøkjarin kann arbeiða longur um/ta hetta gerst neyðugt.

Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði.

Umsøkjarin
Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður hevur roynndir innan skrivstovuvirkið, serliga bokhald og nýtslu av teldu. Kunnleiki til bokhaldsskipanina Concorde er ein fyrimunur.

Lønin verður sett eftir nærri avtalu.

Umsókn
Umsokn við upplýsingum um roynndir og útbúgving verður at senda til KPMG statsautorisoreraðu revisorar Sp/f skjótast gjørligt, og í seina stað lagi 12. juni 2001.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Finngerð D. Olsen á tel 34 34 34.

KPMG statsautorisoreraðu revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34 Fax 34 34 35

Muskelterapeut

Hevur tú:
√ Høvuðpínu
√ Læsta øksl
√ Músa-urm
√ Knýttar vøddar o.a.
√ Ynski um økta vælveru

(Vitgerðartilboðið kann ongantíð fáast sum gávukort)

Hervør Jacobsen
Læknaeksamin Muskelterapeut
Tlf. 213034

eftir kl. 16.00 vanl. garnaðartíðir, 15 tíð hósdag.

Dýrt...??
NEYVAN!

FØROYATELE
Skapið framtíðina saman við okkum

STOVNING ... Øll GSM-hald einans

Kr. 150,-
ÓKEYPIS

Galdandi til 1. aug 2001

Tilboðið er undantikið teletiðarhald. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum